## Størri norsk skerjing

Noreg hevur samtykt at skerja landsins CO2-útlát 30 prosent, men Jens Stoltenberg, forsætisráðharri, segði í gjár, at eydnast tað at fáa eitt gott úrslit á veðurlagstoppfundinum í New York, fer Noreg at umhugsa at økja sína skerjing til 40 prosent. Á toppfundinum, sum byrjar í New York í dag, fara leiðarar úr í meiri enn 100 londum at fyrireika ta avgerandi ST-ráðstevnuna, sum verður í Keypmannahavn í desember. Jens Stoltenberg sigur, at kann Noreg bøta um útlitini fyri einari saemju við at økja sína egnu skerjing til 40 prosent, er stjórnin sinnað at taka tað stigið.



## Kínverjar vaksinera

Í Kina eru heilsumyndugleikarnir fanir undir at vaksinera fólk ímóti Influensa A ella H1N1. Júst í Kina hava myndugleikarnir eggjað heilivágídnaðinum til at finna eina vaksinu ímóti teirri nýggju krímsjúkuni, og fyri fjúrtan døgum síðani bleiv fráboðað, at myndugleikarnir høvdu góðkent tvey sløg av vaksinu. Sambært fjølmiðlunum hava heilsumyndugleikarnir sett sær fyri at vaksinera 65 milliónir fólk ella fimm prosent av landsins íbúgvaratali innan árslok. Í síðstu viku søgdu kinesisku myndugleikarnir, at teir høvdu staðfest 11.722 tilburðir av Influensa A.

# Ungur drongur læt seg freista í óføri

**Tað kann verða ein dýr søga hjá fólki at taka eitt skjótt keypslán í einum handli**

SVIK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað bleiv ein dýr søga, tá ið ein ungur drongur fekk eitt gott tilboð frá einum handilsmanni í Havn.

Hann varð freistaður so illa, at hann gjørdi seg til svikara fyri at fáa eina sofu og eina teldu, hann hevði fingið gott eyga á.

Hann var annars bara farin inn í handilin at keypa nøkur smáting, men gekk kortini ein runt í handlinum og hugdi.

Hann var akkurát fluttur í hús og á rundferðini í handlinum, fekk hann gott eyga á eini sofu og stillaði seg uppi yvir henni at hyggja.

- Eg visti væl, at eg hevði ikki ráð at keypa sofuna, fortaldi hann í Føroya Rætti í gjár.

Men handilsmaðurin var blíður og segði, at pengar vóru ongin trupulleiki, tí hann var vælkomin at læna fyri sofuna.

Drongurin tók av tilboðnum – men hækkaði lánið so at hann fekk eina teldu við á vegnum.

Lánið var ikki frá handlinum sjálvum, men frá einum felagi, ið fíggjar slík keyp fyri viðskiftafólk.



*Ein ungur drongur kom illa fyri, tá ið gav skeivar upplýsingar á einum lániskjali og síðani gavst at betala lánið aftur eina teldu og innbúgv, hann hevði keypt og lænt pengar fyri í handlinum*

### Skeivir upplýsingar

Men tá ið lániskjalið varð útfylt gav drongurin skeivar upplýsingar og tí er hann nú ákærdur fyri svik.

Hann váttaði á skjalinum, at hann hevði arbeiðið, hóast hann var arbeiðsleysur. Tá ið handilsmaðurin spurdi, hvar hann búði svaraði hann, at hann var "akkurát fluttur í hús".

Hetta uppfataði bæði handilsmaðurin og ákæruvaldið sum um at hann hevði upplýst, at hann var fluttur í egin hús.

Sjálvur segði maðurin, at hann hevði ikki meint tað sum um at hann var fluttur egin hús og dómarin helt eisini, at tað var ikki prógvað, at hann tilvitað leyg í hesum føri.

Hinvegin játtaði hann at hava sagt ósatt um arbeiðsstøðuna.

Tað ringasta var, at drongurin segði, at teldan bleiv ólagi beinanvegin.

Men maðurin fortaldi, at hann fekk onga hjálp at umvæla telduna og tí gavst hann at betala lánið.

Men tað hevði lániveitarin onki við at gera og sendi dronginum tískil rokning eftir rokning, umframt at hann varð ákærdur fyri svik.

### Næstan 50% í rentu

Tað eru nú næstan fimm ár síðani at hann tók lánið.

Men tað, sum ikki kemur so øgiliga greitt fram á lániskjalinum, er, at tá ið alt verður lagt saman, hevur lánið næstan 50% í rentu og øðrum gjøldum um árið.

Tað førdi við sær, at lánið, sum upprunaliga var 15.000 krónur, var herfyri komið upp á heilar 40.900 krónur.

Maðurin var harmur um støðuna og segði, at hann vildi bara sleppa burtur úr tí og av tí sama hevði hann longu goldið alla skuldina, so at tað nú er slætt borð.

Men ákæruna um svik slapp hann ikki undan og ákærin vildi hava hann inn at sita í nakrar vikur.

Tað helt dómarin ikki, mest tí, at so long tíð var frá liðin. Hann helt eisini, at maðurin var ikki farin inn í handilin við tí endamáli at svika, men at hann hevði latið seg tøla av einum brádliga íkomnum innskoti.

Tí dømdi dómarin mannin sekan í sviki, men ásetti onga revsing og skikkar hann sær væl tey bæði næstu árini, fellur revsingin heilt burtur.

# Síggja enda á áragomlum stríði um eina gamla bingju

**Tað hevur tikið fleiri ár at avgreiða eina ósemju um eina gamla bingju, sum ein bóndi hevur brúkt til at goyma hoyggj í**

BINGJUSTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Skuldu vit mett eftir tíðini, tað hevur tikið at fingið ein enda á hesum málinum, skuldi ein trúð, at talan var um einki minni enn eitt stórmál.

Men so er ikki!

Hetta er eitt mál um eina 40 fót bingju sum ein bóndi hevur brúkt at goyma hoyggj í.

Men tað hevur tikið útvið 20 ár at fáa enda á sakini. Og endin var, at nú má bóndin taka bingjuna burtur - ella í minsta lagi flyta hana einar 100 metrar.

Tað var fyri umleið 20 árum síðani, at ein bóndi keypti sær eina 40 fót bingju at seta í hagan at goyma hoyggj í, tí hann hevði onki hoyggjhús.

Áðrenn hann setti bingjuna upp, spurdi hann bæði kommununa og Landsverk, men haðani var ongin viðmerking.

Bingjan stendur einar 200 metrar frá eini á.

Og akkurát her er trupulleikin, tí av tí, at áin er meiri enn fýra metrar breið, krevur náttúrufriðingarlógin, at hon er minst 300 metrar burtur frá.

Tí varð málið tikið upp og síðani hevur tað reikað runt í skipanini, har bæði friðingarmyndugleikar, kommunustýri og Føroya Rættur hava verið upp í leikinum.

Men nú fær tað ein enda. Føroya Rættur dømdi nakað síðani bóndan at fáa bingjuna burtur av staðnum, men hann hevur ikki aktað.

Tí er hann einaferð enn drigin í rættin, har ákærin vil áleggja honum at betala bót fyri at sýta at gera eftir boðum. Men harafturat skal bóndin hava tvingsilsbøtur, til bingja er burtur.

Bóndin skilir onki av, hví akkurát hansara bingja skal takast burtur úr rúgvuni, tí tað stendur eitt ótal av bingjum og sløðist í haganum.

Men trupulleikin er, at hansara bingja stendur nærri enn 300 metrar frá eini á, sum er minst fýra metrar breið og tað er munurin á hansara bingjum og øðrum bingjum.

Men nú skal so Føroya Rættur einaferð enn taka støðu til málið. Bóndin er sinnaður at fáa bingjuna burtur, men trupulleikin er, at hon er full av hoyggi og tí bað hann um freist til 1. juni og tað hevði ákærin onki ímóti.

Tá lovaði hann at flyta bingjuna, ella í minsta lagi a flyta hana 100 metrar afturat burtur frá ánni.